**TELDA TIL SØLU**
Telda til øll endamál, klárar øll spøl, og er vælegnað til alt grafiskt arbeiði. Pentium 4 2.4 Ghz 1.5 GB ram PC266 36GB SCSI hardisk, Plextor 40/12/40, SCSI brennara. DVD avspælara, Adaptec 2940U2W SCSI, Controllara. NVIDIA Geforce TI4400, 128 MB ram grafikkkort. 17" Flatskermur. 2 Firewire port, netkort 10/100. Windows XP danska versión. Til sølu fyri einans 16.000,- kr
*Skriva til egfinnionki@yahoo.dk*

**PLAYSTATION TIL SØLU**
7 spøl + 7 demodiskar, 2 joystik, 1 memory card til sølu fyri 1200 kr.
*Tlf. 371514*

## Tónleikur

**YNSKIST**
Stórt sjónvarp ynskist fyri sámuligan prís.
*Tlf. 447942*

**STEREOANLEGG TIL SØLU**
Samsung stereoanl. kr. 1.200,-
*Ring 318819 ella 262917*

**TRUMMUSETT TIL SØLU**
Peace trummusett – 5 trummur, hi-hat, 1 skál. Lítið brúkt í uml. 2 ár. Barnastødd. Til sølu fyri 3.500 kr.
*Tlf. 506121/314328*

**SURROUND STEREOANLEGG TIL SØLU**
Topp serian hjá Sony (Es serian). Ein souround forsterkari og ein fløguspælari. Eisini fylgja 5 hátalarar við. Prísuppskot kr. 7.000,- (Nýprísur ca kr. 18.000,-)
*Tlf 21 36 36, T-postur: mb@formula.fo*

**BÝT UM**
Eg eigi danskar og útlendskar fløgur og lp. Eg leiti eftir føroyskum fløgum.
*Tlf. 0045 8642827 - 0045 26747474 (Eisini sms)*

**TIL SØLU**
Opel CD spælari (CDR500) møguliga kann ísetan verða við í keypinum til sølu fyri 1.500 kr.
*Tlf. 722880 / 422880*

**TIL SØLU**
Tveir bilforsterkarar av merkinum Pioneer GM-X702 ca 2x110W ella 1x300W Clarion 2x90W ella 1x30W, 1.000 kr. pr. stk.
*Tlf. 722880 - 422880*

## Út- & Sjónvarp

**TIL SØLU**
Nýtt sjónvarp/video 20" Samsung. Prísur 3.000,-
*Tlf. 222842 ella ulfnurdl@post.olivant.fo*

**LG DVD SUPER SLIM**
til sølu. Ongantíð brúktur.
*Tlf. 319800, e. kl. 17*

**DIGITALUR MÓTTAKARI**
Ein Strong Dig. móttakari við plássum til 2 CA-modul + Conaz modul til sølu fyri 2.000 kr.
*Tlf. 554564*

**PARABOL**
Multi Focus Dish SMW OA-1600 110x160 cm, ætlað til fleiri LBN, til sølu.
*Tlf. 443128 / 220325*

## Ymiskt

**FRÁ MISSIÓNSHÚSINUM Í HVALBA**
Basarur verður í Roynhúsinum tann 18.-19. okt. Er tað nakar, ið vil stuðla við einum luti. Vinarliga ring til ein av okkum á tlf. 375336, 375080, 375656, 375200, 375256, 375424 ella 222899. akk fyri stuðulin.
*Missiónshúsið*

**FLETTIBORÐ**
Snotiligt flettiborð til sølu fyri 425 kr. stk. Verður sent um alt landið. Palja@kallnet.fo
*Tlf. 213695*

**RESTÚTSØLA**
t.d. barnasengur, grulvigarðar, babyliftir, combivognar, tvillingastólar o.a. nógv niðursett. Opið verður leygardagin frá kl. 10-17.
*Fa. Obert Eliasen, Fuglafirði, tlf. 256517*

**NOKIA 3310**
v/ óbrúktum talutíðarkorti! Til sølu fyri bert 800 kr. Battaríið er ikki so gott, men kann brúkast! Uml. 10 eyka frontar fylgja við.
*Tlf. 214789*

**RADIATORUR**
h. 55,5 l. 100 einkultur, til sølu vegna umbygging.
*Tlf. 372140*

**ÓBRÚKTUR**
Canal digital kassi til sølu fyri 2.500 kr.
*Tlf. 573230*

**KAMERA**
til Sony Ericsson fartelefon til sølu.
*Tlf. 447942*

**DEKODARI TIL SØLU**
Dekodari til Canal digital, parabolhøvd og ISDN boks til sølu.
*Tlf. 312077*

**BRENNIOVNUR**
til sølu fyri 5.000,-
*Tlf. 313593*

**JØRÐ TIL SØLU Á UPPSØLUM**
3/5 av matr. nr. 738 A sum er 2.592 fermetrar innangarðs, og 3 gyllin uttangarðs til hægstbjoðandi.
*Tlf. 456486/456486*

**TIL SØLU**
Ein Nokia 440. fartelefon nmt 450. Berbar, við bil- og heimaladara til sølu. 500,-
*kajoklad@post.olivant.fo*

**MANNFÓLKA-HJÁLMUR YNSKIST**
Hjálmur í hampuligum standi ynskist til ein rímiligan prís.
*Niels, 243348*

**MOTOROLA FARTELEFON**
til sølu við ladara og tasku. Vanligur prísur 3.885,- nú 2.500,- 4 vikur gomul.
*Tlf. 318667/253063*

**NIKON F90X FOTOTÓL**
Lítið brúkt Nikon F90X fototól v/ trimum linsum 35-80 mm 1:4 - 5,6 D + 70-300 mm 1:4-5,6D + 50 mm 1:1,8 + Multi Power vertikøl greb MB-10 + SB-28 blitz + 2 filtur + tasku, sum nýtt til sølu fyri 13.000 kr.
*Tlf. 505052*

**FERÐAST SAMAN**
úr Vágum hósdagin 18. sept. til Keypmannahavnar – heimaftur mánadagin 22. sept.
*Tlf. 227406*

**FERÐALAG SAMAN**
til Keypmannahavnar vikuskiftistúr frá hós. 25. til sunnudagin 28. september.
*So ring 504675*

**FLÓTANDI STOYPIJARNSDEKSIL**
Flótandi stoypijarnsdeksil í góðum standi (tolir 40 tons) við gummi pakningi verður selt fyri kr. 300. Útvendigt mát á hálsinum er 315 mm. Nýprísur er kr. 1.400.
*Tlf. 322200*

**HVÍT BORÐPLÁTA**
180 cm long, rundaðan kant, við hvítum vaski. Til sølu fyri 200 kr.
*Tlf. 503150, keks@kallnet.fo*

**ÓBRÚKT SMS CHATBOARD**
til Nokia 51xx og 61xx model, góð til m.a. sms, telefonbók v.m., til sølu fyri 150 kr. + frakt.
*Tlf. 0045 8642827 - 0045 26747474 (Eisini sms)*

**UPPLADARI**
til Ericsson 626, óbrúkt, við antennu, til sølu fyri 100 kr. + frakt.
*Tlf. 0045 8642827 - 0045 26747474 (Eisini sms)*

**NAKRAR SPANNIR**
við gággum til sølu. Mugu avheintast.
*Tlf. 421080*

**SEYMIMASKINA**
av merkinum Major Colombine til sølu fyri 1.000 kr. Lítið brúkt.
*Tlf. 455421 ella 503554*

**TIL SØLU**
Háfjallssól at hanga undir loftið. hevur 12 sólrør.
*Tlf. 422475 ella 283875*

**TIL SØLU**
Ljóst brúnt skifer 18 fermetrar. Ljós-aggregat 550 W.
*Tlf. 228371*

# Statskvett í mentamálaráðnum



*Anfinn Kallsberg setir Annitu á Fríðriksmørk í starv sum landsstýriskvinna komandi mikudag. Fyrr enn tá hevur hon einki at gera í mentamálaráðnum*

**Tað er løgmaður, og ikki politiskir flokkar, sum setir landsstýrismenn í starv, sigur Anfinn Kallsberg. Hann er ónøgdur við framferðina hjá Tjóðveldisflokkinum, nú Annita á Fríðriksmørk er farin til arbeiðis í mentamálaráðnum, hóast hon ikki er formliga tilnevnd enn**

SETAN
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Tjóðveldisflokkurin hevur borið seg skeivt at í tilnevningini av nýggjum landsstýrismanni við mentamálum.

Tað bendir alt á, nú tað frættist, at Annita á Fríðriksmørk hevur sett seg í heitasta stólin í mentamálaráðnum. Sosialurin hevur spurt seg fyri í Mentamálaráðnum, og har vátta tey, at Annita á Fríðriksmørk longu er farin til arbeiðis sum mentamálaráðharri, hevur fingið egnan skrivara og e-post adressu, hóast hon ikki formliga er sett í starv enn.

## Hongur ikki saman

Tjóðveldisflokkurin hevur samtykt, at Annita á Fríðriksmørk skal avloysa Høgna Hoydal sum landsstýrismaður við mentamálum. Men hóast Høgni Hoydal bæði er floksformaður og varaløgmaður, so eru tað hvørki hann ella flokkurin, sum formliga gera av, hvør skal sita í mentamálaráðnum. Ta avgerðina eigur løgmaður einsamallur sambært stýrisskipanini. Hann setir og loysir landsstýrismenn úr starvi og hevur eftirlit við teimum.

Tí er tað eisini fallið Anfinni Kallsberg løgmanni fyri bróstið, at Tjóðveldisflokkurin tekur sakina í egnar hendur. Løgmansskrivstovan boðar nú í almennum tíðindabrævi frá, at løgmaður hevur gjørt av at seta nýggjan landsstýrismann í mentamálum mikudagin 17. september 2003. Móttøka verður á Løgmansskrivstovuni sama dag klokkan 14.30.

Í hesum sambandi staðfestir løgmaður soleiðis:

»Í fjølmiðlunum hevur verið at hoyrt, at Tjóðveldisflokkurin hevur tilnevnt nýggjan landsstýrismann í mentamálum, og í dag bórust tíðindi í útvarpinum um, at Annita á Fríðriksmørk er farin til verka sum landsstýrismaður.

Hetta hongur ikki saman. Sambært lóg um stýrisskipan Føroya er tað einans løgmaður, sum kann seta landsstýrismenn,« ljóðar tíðindabrævið, dagfest 10. september.

## Líkt statskvetti

Hetta kann ljóða sum ein lítil paragraff-petitessa, men hinvegin eru orsøkir til, at vit hava greiðar reglur og lógir. Tær skulu haldast.

Ein løgfrøðingur í umsitingini, sum Sosialurin hevur tosað við, heldur fyri við einum smíli á varrunum, at hetta minnir um eitt statskvett. Rættast hevði verið, um eingin landsstýrismaður slapp inn um dyrnar í einum aðalráði, uttan at hann hevur eitt undirskrivað pappír frá løgmanni í hondini, har váttan er fyri, at viðkomandi er tilnevndur landsstýrismaður. Annars kann Guð og hvør maður møta upp og vera við, at hann er nýggjur landsstýrismaður, sum er komin at seta seg inn í málini.

## Alneyðug ábyrgd

Løgmaður undirstrikar, at tað ikki er fyri fáa balladu ella skapa ravagu, at hann hevur lyft fremstafingur ímóti sínum samstarvsfeløgum. Men hann heldur tað hava stóran týdning, at skipanin, sum vit liva undir, verður vird.

– Hetta stendur greitt í stýrisskipanarlógini, sum er til at halda. Í síðstuni hevur tú fingið ta fatan, at tað er Tjóðveldisflokkurin, sum setir nýggja landsstýrismannin, men tann ábyrgdin er mín, sigur Annfinn Kallsberg.

Fyri løgmann snýr málið seg um, at vit mugu liva upp til ta ábyrgd, sum stýrisskipanarlógin leggur á hvønn einstakan landsstýrismann, íroknað løgmann.

– Tá tú gerst landsstýrismaður, tekur tú bæði við avgerðarrættinum og ábyrgdini á einum øki, og tað mugu vit halda fast við. Ein landsstýrismaður, sum enn ikki er settur, kann ikki taka avgerðir, og tí ber hetta als ikki til. Landsstýrismaðurin Høgni Hoydal, sum er settur av løgmanni, hevur ábyrgdina fyri mentamálum, til eg havi sett ein nýggjan, og tað verður mikudagin komandi, staðfestir Annfinn Kallsberg løgmaður.

**INNIHURÐAR TIL SØLU**
Mál-hurðablød: 73/204 cm. Vinstra, myrkt træ, í góðum standi, v/ karmum. Báðar fyri kr. 400,-
*Tlf. 441444*

**ER TAÐ NAKAR**
ið eigur ein satelit móttakara analog at selja mær.
*Vinarliga ring 264209 – 212319*

**HURÐAR TIL SØLU**
7 stk. hurðar við karmi, Elm, til sølu.
*Tlf. 263280*

**OPIÐ HÚS FYRI LIMIR**
Í sambandi við at felagið hevur fingið høli, hava vit opið hús leygardagin 27.09.03 kl. 14-18. Føroya Heimavirkisfelag J. Paturssonargøta 24
*Føroya Heimavirkisfelag*

**TIL SØLU**
10 Alumantakplátur til sølu fyri 1/2 prís. Eitt marmor-sofaborð til sølu fyri 1000,- kr.
*Tlf. 423240*



## HEILSANIR



Randi Hjalt er den 16. august viet til Steen Kofoed i Vallensbæk Kirke. Begge er fra Brøndby DK



**Góði Pauli**
Hjartaliga tillukku við 70 ára føðingardegnum tann 11. sept. Vit gleða okkum til veitsluna leygarkvøldið.
**Ynskja eysturoyartrøllini í Havn**



**Pauli Vang, 70 ár**
Pápa, verpápa og abba okkara ynskja vit hjartaliga tillukku við stóra degnum 11. sept.
**Schandorff, Sigrid, Hergeir og Annika**



**Góði Steffan**
Hjartaliga tillukku við 8 ára degnum í dag og alt tað besta ynksja vit tær.
**Mamma, babba, Ronni og Teitur**



**Hey Mirjam**
Vit báðar vilja her við ynskja tær tillukku við 40 ára degnum í dag. Alt gott í framtíðini. Vit gleða okkum til februar.
**Heilsan I.D.P. og S.J.M.**

**Góði babba og „sviger“**
Hjartaliga tillukku á 70 ára føðingardegnum í dag. Her høvdu vit tað stuttligt.
**Tær kærastu heilsanir frá Mariannu og Jóhan Esbern**



**Góði langabbi**
Hjartaliga til lukku við føðingardegnum.
**Kærar heilsanir Jona, Rebecca og Karl**





**Góði elskaði abbi**
Hjartaliga tillukku á 70 ára degnum í dag 11. sept. Gott at vit eru flutt heim aftur til tykkum. Alt tað besta frá
**Barbaru og Jógvan Pauli**



**Góða omma**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum 7. sept. og alt tað besta í framtíðini. Eg eri so góður við teg.
**Ynskir Jákup Sólberg**

**Góði elskaði Dánial**
Hjartaliga tillukku við tínum fyrsta føðingardegi. Vit elska teg sooo nógv. Jesus pápi signi teg.
**Heilsan mamma, babba og Símun Pætur**





**Góði Josva**
Tillukku við 1 ára degnum. Vit gleða okkum til hvørt vikuskifti tú er hjá okkum.
**Mostur og mamba**



**Halló Lív**
Eg vil bara ynskja tær hjartaliga tillukku við 24 ára degnum 11. sept. Alt tað besta.
**Heilsan ein sól**



**Okkara elskaði lítli Josva**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum. Jesus signi teg.
**Omma og abbi í Gerðisbrekku**

## Heilsanir
30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:............................................................................
..........................................................................................
..........................................................................................
..........................................................................................
..........................................................................................
..........................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..........................................................................
Bústaður: .....................................................................
Bygd/býur: ...................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«